FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Deildin fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi

Tórshavn – Juli 2024

# VÆLKOMIN Á DEILDINA FYRI HEILSU- OG SJÚKRARØKTARVÍSINDI (DHS) Á FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

**Góðu nýggju lesandi á Master í Heilsuvísindum**
Vit ynskja tær hjartaliga til lukku við, at tú ert tikin upp til masterútbúgving í heilsuvísindum. Niðanfyri er stutt kunning í samband við lestrarbyrjanina á DHS.

**Felags innleiðsla**
Felags innleiðsla fyri nýggjum lesandi á øllum Setrinum verður:

**Mánadag 19. august 2024 kl. 9.00-11.00**
**í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestrarabryggja 15)**

Síðani verður farið á deildina fyri at fáa nærri kunning um útbúgvingina, skeiðsætlan, pensum o.a. Við lestrarbyrjan verður lesnaður útflýggjaður til fyrstu tíðina, og møguligar bøkur kunnu bíleggjast eftir lestrarbyrjan.

**Vælkomin til eina spennandi útbúgving á Deildini fyri heilsu – og sjúkrarøktarvísindi.**
Vit gleða okkum at síggja teg.

Vinarliga,

Anna Sofía Veyhe, lektari og útbúgvingarleiðari fyri Master í heilsuvísindum

# Skrá fyri innleiðsluna á Deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi 2024

**Mánadagin 19. august í Kongshøll í Sjóvinnuhúsunum, Vestarabryggja 15**

Tiltakið byrjar kl. 09.15, men tit skulu helst møta eitt sindur fyrr at heinta tykkara lestrarkort uttan fyri Kongshøll.

| | |
|---|---|
| kl. 09:00 | Skráseting (lesandi fáa lestrarkort og kunningarmappu) |
| kl. 09:15 | Rektarin bjóðar vælkomin |
| kl. 09:25 | Lestrarskrivstovan bjóðar vælkomin |
| kl. 09:30 | Tónleikur |
| kl. 09:45 | Røða |
| kl. 10:00 – 11:00 | Básar á Svalanum |

*Lesandi fara út á deildirnar*

| | |
|---|---|
| kl. 11:00 | Magni Mohr, dekanur, bjóðar vælkomin |
| kl. 11:15 | Lesandi á master í heilsuvísindum fara upp á 5. hædd í **høli 514** |
| kl 11:30 | Deildin bjóðar ábit |
| kl 12:00 | Kunning frá útbúgvingarleiðara, Annu Sofíu Veyhe |
| kl 12:30 | Útbúgvingartoymið presenterar seg |
| kl. 12:45 | Tryggja at øll lesandi eru komin á Moodle (havi telduna við) |
| kl. 13:00 – 14:00 | Innleiðsla til *Grundskeið í vísindaástøði og granskingarháttaløg* |

**Týsdagin 20. august**

Kunnandi tiltak við ymiskum viðkomandi fyrilestrum verður í Kongshøll í Sjóvinnuhúsinum (Vestarabryggja 15) millum kl. 9-11. Endalig skrá kemur seinni.

| | |
|---|---|
| kl 11:45 | Rundvísing í Sjóvinnuhúsinum |
| kl 12:00 – 15:00 | Innleiðsla framhald: *Grundskeið í vísindaástøði og granskingarháttaløg* (høli 514) |

**Mikudagin 21. august**

| | |
|---|---|
| kl. 09:00 - 12:00 | Innleiðsla framhald: *Grundskeið í vísindaástøði og granskingarháttaløg* (høli 514) |

**Hósdagin 22. august**

Einki á skrá

**Fríggjadagin 23. august**

| | |
|---|---|
| Kl. 10.00 -12.00 | KT-vegleiðing í auluni á Námsvísindadeildini (Frælsið 20) – Skipað verður fyri víðkaðari KT-kunning fyrrapartin av degnum, har tey lesandi fáa høvi at sita við telduni og fáa beinleiðis vegleiðing at rita inn í ymisku skipanirnar, sum verða brúktar í útbúgvingini. |
| Kl. 20.00 | SeturSamanShow í Reinsarínum |